# burðardyggan orkupolitik

víðagitna ST- ráðstevnan hildin í Rio de Janeiro har Agenda 21 skjalið varð samtykt. Her verður heitt á heimsins lond at gera ætlanir fyri burðadygga menning á tann hátt, at tikin verða fyrilit fyri umhvørvi og náttúru, tá avgerðir verða tiknar innan m.a. búskaparlig og sosial øki. Hetta merkir at øll lond hvør í sínum lagi skulu gera ætlanir til minking av dálkingini, avmarka veðurlagsbroytingar, verja um ozonlagið, minka um tilfeingisnýtsluna o.s.fr.

Áherðsla verður løgd á at loysa umhvørvistrupulleikarnar út frá eini heildarmynd av mannaskapaða samfelagnum í mun til "heilsuna" hjá náttúruni, og betur er tá við fyribyrging heldur enn upprudding tá skaðin er hendur. Verður "heilsa" náttúrunar so vánalig at hon doyr, vilja vit og alt annað livandi fara sama veg av tí einfaldu orsøk, at alt lív er grundað á náttúrunar treytir.

Brundtland- kommissiónin gjørdi hesa lýsing av hugtakinum burðardygg menning.

Burðardygg menning lýkur tørvin hjá verandi ættarliðum og forðar samstundis ikki fyri møguleikunum hjá komandi ættarliðum at lúka teirra tørv. Burðardygg menning er tí ikki ein endalig samljóðsstøða, men heldur ein broytingartilgongd, har gagnnýtsla av tilfeingi, skipan av íløgu- og fíggingarhættum, gongdin í tøkniligu menningini og umsitingarligu viðurskiftunum annars, verða sambært framtíðar eins og nútíðar tørvi.



*Eitt kilowatt av vindorku kostaði í 2003 25 oyra at framleiða, meðan prísurin í oljuframleiddum ravmagni lá um 33 oyru. Takast skal við at oljan tá kostaði um 35 US$ fyri tunnuna. Við oljuprísum á uml. 60US$ fyri tunnuna var vindorkukostnaðurin í 2005 gott 1/3 av oljukostnaðinum.*

## ST, ES og Norðurlendskir sáttmálar

Føroyar eru sambært grein 5 í heimastýrislógini stjórnarrættarliga bundnar at halda altjóða-rættarligar sáttmálar, ið Danmark hevur góðkent - um ikki beinleiðis undantak er orðað fyri Føroyar. Her eru sostatt Marpolsáttmálin frá 1973 um fyribyrging av dálking frá skipum, Genévesáttmálin frá 1979 um minking av langtrøkkandi luftdálking, Wiensáttmálin frá 1985 um verju av ozonlagnum, Rio-sáttmálin, Agenda 21 ætlanin og Veðurlagssáttmálin frá 1992, og so Kyoto protokollin frá 1997, ið politiska leiðsla landsins ikki var før fyri at leggja rygg til, men mátti biða donsku stjórnina um tíðarleyst fyrivarni føroyinga vegna. Grønlendingar vóru meiri mannsligir og staðfestu Kyoto-protokollina. Annar serstakur ST-sáttmáli er sonevndi Århussáttmálin frá 1998, ið fevnir um almenna upplýsingarskyldu og luttøku borgarans við rættindum at kæra fyri dómstólarnar avgerðir til allar verkætlanir, ið hava við náttúru og umhvørvið at gera. Sáttmálin bleiv settur í gildi í Danmark í 2000 - við fyrivarni fyri Føroyar.

ES-reglugerðir og viðtøkur innan burðardygga menning mugu skiljast sum eisini galdandi fyri tey norðanlond, ið ikki eru beinleiðis limir í ES. Innari ES-marknaðurin og handilstreytir gera sítt til at viðtøkur og direktivir vanliga verða fylgd.

Í norðurlendskum høpi samtyktu norðurlendsku forsætisráðharrarnir saman við politisku leiðaru-num fyri Áland, Grønland og Føroyar á fundi hin 9. november 1998 í Oslo Deklaration om et bæredygtigt Norden. Viðtøkur og arbeiðsskrá bleiv sett í gildi í 2001 og langtíðarætlanin Nordisk Miljøhandlingsplan kom at galda inntil 2020. Ætlanin var send til hoyringar í øllum norðanlondum. Úr Føroyum vóru einans viðmerkingar frá Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Náttúruverndar-felag saman við 30 norðurlendskum feløgum og virkjum.

Hvussu hevur so gingist við føroysku uppfylgjanini av ST, ES og Norðurlendsku samtyktunum um burðardygga menning? Spurningurin má standa ósvaraður, tí her er lítið og einki ítøkiligt komið av skafti - annað enn tað einstaklingar í samstarvi við onkra kommunu royna at virka fyri innan Agenda 21 ætlanina. Demokratisku rættindi borgarans at kæra náttúruverndarmál fyri Føroya Rætt eru ikki til staðar, og Løgtingsins Umboðsmaður kann ikki viðgerða mál, ið hoyra undir danskt dómsvald. Folketingets Ombudsmand má roknast við ikki at hava áhuga í innanhýsis føroyskum viðurskiftum.

## Burðardygg menning innan orkusektorin

Føroyska samfelagið virkar í dag uppá lænta tíð og keyp av orku úr útlandinum. 97% av allari orkunýtsluni stavar frá olju, ið ikki fer at bera samfelagið gjøgnum 21. øld - soleiðis sum vit kenna tað í dag. Um olja verður tøk í 10, 20 ella 30 ár afturat er sum so uttan týdning. Støðan er ikki burðardygg, men kann skoðast sum ein fella, ið kan flyta samfelagið aftur í miðøldina. Einasta loysn er at leggja um meðan tíð er til varandi orkukeldur, ið allar eru grundaðar á sólorku sum megin-keldu. Verandi framleiðsla av vatnorku er ikki serstakt máttmikil. Hetta tí landið og affalsøkið er lítið, men einamest tí framdar útbyggingar liggja ov lágt í lendinum og tí ikki geva ta orku, ið fingin kundi verið um farið varð upp í hæddina.

Afturat hesum verður stóra vatnnøgdin á vetri ikki gagnnýtt til t.d. hitamiðstøðir, men fær loyvi at renna óbrúkt um byrgingarnar. Sambært áður nevndu ST- og norðurlendsku sáttmálunum skal orkuframleiðsla við inntrivum í náttúru geva so stóra úrtøku sum gjørligt. Eiðisverkætlaninar geva bert ein brotpart av tí tær kundu givið, og eru sostatt ikki nóg burðardyggar. Fyrilit eru tí ikki tikin hvørki til náttúruvernd, orkuúrtøku ella búskap.

*Føroyska samfelagið virkar í dag uppá lænta tíð og keyp av orku úr útlandinum. 97% av allari orkunýtsluni stavar frá olju, ið ikki fer at bera samfelagið gjøgnum 21. øld - soleiðis sum vit kenna tað í dag. Um olja verður tøk í 10, 20 ella 30 ár afturat er sum so uttan týdning. Støðan er ikki burðardygg, men kan skoðast sum ein fella, ið kan flyta samfelagið aftur í miðøldina*

SEV hevur ta áskoðan, at tað er lætt at útvega olju, og tí er olja ein støðug og álítandi orkukelda. Slík áskoðan frá ravmagnsfelag okkara er sera vandamikil fyri samfelagið. Við færri og færri olju-fundum, hækkandi eftirspurningi og kostnaði er og verður olja av størsta týdningi fyri lond, ið vilja sita á heimsveldinum og tí hetta hevur við sær av ólukkum.

Einasta gongda leið er at leggja um fra olju til varandi orkukeldur. Hetta vil bøta um gjaldjavnan, loysa okkum frá eini ótryggari orkuveitanarstøðu og skapa nýggj arbeiðspláss í menning av nýggari orkutøkni.

## Ravmagn til hitamiðstøðir og brennievni

Mest máttmikla tøknin til gangnýtslu av varandi orkukeldum er í løtuni vindorka, har vit hava um 4.000 fulllasttímar. Til samanbering hevur Danmark einans 1.700 tímar. Íløgukostnaður pr. ár fyri eitt kilowatt av vindorku er hjá okkum um 1,80 kr. meðan vatnorka er 10 til 20 kr.

SEV hevur ført fram at bert 4-5 % av vindorku kunnu setast til ravmagnsnetið. Onnur oyggja-samfeløg t. d. Kapp Verde oyggjarnar hava heili 30% vindorku uttan at hetta órógvar ravmagnsnetið og el-tól.

Vindorka kann nýtast til hitamiðstøðir til fjarhita og annars til einasta brennievni vit sjálvi kunnu framleiða nevniliga vetni. Hesum fáa vit sum frá líður stóran tørv á, og er tí øll orsøk til at politiski myndugleikin fremur landsplanlegging fyri framtíðar vindorkuøkjum.

Eitt kilowatt av vindorku kostaði í 2003 25 oyra at framleiða, meðan prísurin í oljuframleiddum ravmagni lá um 33 oyru. Takast skal við at oljan tá kostaði um 35 US$ fyri tunnuna. Við oljuprísum á uml. 60US$ fyri tunnuna var vindorkukostnaðurin í 2005 gott 1/3 av oljukostnaðinum.

Ætlaða fjarhitamiðstøð frá Sundsverkinum er ein feilíløga - just sum Eiði 2 og 4. Fyrilitið um burðardygga menning er ikki til staðar hvørki á Sundi enn minni í ætlaðu Eiðisútbyggingunum. Við framtíðar ótryggu oljuveiting kunnu brúkarar/gjaldarar av fjarhitaskipanini frá Sundsverkinum koma í álvarsaman trupulleika av einum sera høgum oljukostnaði. Fjarhitaskipanin frá Sunds-verkinum skuldi verið framd fyri fleiri árum síðan - nú er í seinra lagi.

Samlaði orkutørvur landsins til ravmagn, hitaorku og flutningsorku kann á burðardyggan hátt skipast alleina við varandi orkukeldum. Fyri at náa hesum máli, má politiska leiðsla landsins taka seg um reiggj og fremja neyðuga lógarverkið soleiðis at einstaki borgarin og vinnulívsmaðurin sleppur til verka. Grundleggjandi treyt er at náttúruumsitingin fæst at virka - og ikki minst at demokratisku rættindi borgarans at gagnnýta náttúrutilfeingið á burðardyggan hátt verða sett í hásætið.

Yvirlýsingin er send Landsstýri, Løgtingi og náttúrumyndugleikum.

*Nevndin*
*Føroya Náttúruverndarfelag*